# 24 fólk til psykiatriska eftirútbúgving

*Eftir at hava tikið eftirútbúgving í psykiatri hava hesi 24 fólkini nú fingið prógv síni handað*



Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum hevur skrivað søgu.

Fyrsta formliga eftirútbúgvingin er nú gjøgnumførd á Landssjúkrahúsinum.

Útbúgvingin er løgd til rættis saman við Undervisningsafdelingen á Risskov og 17. juni fingu 24 fólk handað prógv í Veitsluhøllini.

Útbúgvingin hevur bæði verið tvørfaklig og tvørsektoriel í 12 modulum yvir eitt ávíst tíðarskeið.

At áhugin fyri hesi eftirútbúgvingini hevur verið stórur prógvar einamest, at allir 24 luttakarnir, ið byrjaðu fullførdu útbúgvingina.

# Ráðstevna um dr. Jacobsen í Hetlandi

**Í mai mánaði komandi ár verur ein serstøk føroysk-hetlendsk ráðstevna um Jákup Jakobsen, doktara, og rannsóknir hansara**

Jákup doktari var málfrøðingur og bókmentafrøðingur og savnaði skaldskap á manna munni.

Hann var eisini fyrsti føroyingur, ið vann sær doktaraheiti, hvørs evni var norrøna málið í Hetlandi.

Høvuðsfyrireikari til stevnuna er Brian Smith, skjalavørður á hetlendska skjalasavninum. Medfyrireikari er Turið Sigurðardóttir, lektari á Føroyamálsdeildini.

Fyrilesarar á ráðstevnuni verða úr Føroyum, Hetlandi og aðrastaðni frá. Ráðstevnumálið verður enskt.

Úr Føroyum fara hesi at halda fyrilestur:

Eyðun Andreassen, dr. phil.; Marianna Debes Dahl, rithøvundur; Edith Bugge, M.A.; Arne Thorsteinsson, fornfrøðingur og Hjalmar P. Petersen, málfrøðingur.

Sagt verður, at hjá føroyingum ber væl til at fara við Norrønu á ráðstevnuna.

# Pleaser royna aftur

Hóast hálvt føroyska orkestri Pleaser gjørdust ov stuttir í kappingini um at vinna Starfighters kappingina á Skanderborg festivalinum, er bólkurin ikki liðugur við at kappast. 2. september fer bólkurin at kappast í DM i Rock. Bólkurin var við í tíðindasendingini á TV2 Øst sunnukvøldið.

Á heimasíðuni www.tv2regionerne.dk undir TV2 Øst 14. august ber til at síggja innslagið, sum eitur Talent på prøve, har er samrøða við bólkin, og partur av einum lag verður spælt.

**nud**

# Roktúrur hjá Nærabergi

*Týskvøldið skuldi Næraberg koma á Klaksvík, og sum skilst, so hevur talan verið um veruligan rokfiskiskap seinasta túrin. Norðlýsið skrivar á netinum, at tað einans hevur tikið skipinum tríggjar vikur at fylla lastina við svartkjafti. Næraberg lastar ikki færri enn 815 tons av surimi og 240 tons av mjøli.*

**-jm**



## Napoleon lagdur

Manningin á rækjutrolaranum hevur fingið uppsagnarbræv

Dimmalætting skrivaði mánakvøldið, at rækjutrolarin, Napoleon, nú eisini er komin á listan yvir fyrrverandi rækjuskip í føroyska flotanum.

Manningin á skipinum fekk undan vikuskiftinum boð um, at skipið verður lagt, tá ígongdverandi túrurin við Svalbard er av.

Ikki óvæntað, so eru tað høgir olju- og lágir rækjuprísir, sum eru orsøkin til, at skipið verður lagt.

**-jm**

## Bussar koyra til Svangaskarð

Fótbóltssambandið boðar á heimasíðu sínari frá, at skipað verður fyri busssambandið úr bæði Havn og Leirvík, nú landsliðið skal spæla móti Kypros mikukvøldið.

Av Farstøðini í Havn verður koyrt kl. 17.30 og úr Leirvík koyrir bussurin kl. 18.15 verður sagt.

**-jm**

## Gamla Vestlax konkurs

Gamla virkið hjá Vestlax í Hirtshals, sum Pan Fish seinni keypti frá føroyska felagnum, er nú farið á heysin.

Vónin var annars, at ein loysn kundi finnast millum Pan Fish og ognararnar, men hendan er nú dottin niðurfyri.

Verkið í Hirtshals var eitt skifti størsta arbeiðspláss í býnum. Tá starvaðust um 500 fólk har. Seinnu árini hevur talið av starvsfólkum ligið um 200, men nú eru hesi altso eisini send heim.

**-jm**